# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til G1 (avloysarar)

Søkt verður eftir fýra sjúkrarøktarfrøðingum sum avloysarar til Bráðfeingisdeildina G1 í skiftandi vaktum á brøki 0,7 ella 0,8 til setan 1. mai 2007 ella skjótast gjørligt til og við árið út, við møguleika fyri leingjan.

Deildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum umfata intensiva deild, dagskurð, viðrakning, skaðastovu, bráðfeingismóttøku og kommunulæknavakttænastuna. Starvsettu koma eftir tørvi at hava ymiskar arbeiðsuppgávur, sum í høvuðsheitum eru røkt og viðgerð av intensivum sjúklingum við seingjarplássum til 5 intensivar sjúklingar, 4 í dagskurð, 5 í viðrakning og pláss til skaðastovu/bráðfeingismóttøku.

**Vit kunnu bjóða**

- góða innleiðslu
- skipaða upplæring
- fjølbroytt arbeiði/nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar, ið hava góðan fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning

**Krøv til umsøkjararnar**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- tú hevur medferðarkenslu og kanst skjótt skapa tær yvirlit
- kunna arbeiða sjálvstøðugt og kreativt
- áhuga fyri fakligari menning og avbjóðingar innan sjúkrarøktina
- er fleksibul og hevur góð samstarvsevni, bæði mono og tvørfakliga
- er opin og jalig/ur
- teldukunnleiki
- lættliga kann fáa ein konstruktivan dialog og tilknýti til sjúklingar og avvarðandi

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**

- fakligar royndir at viðgera og røkta sjúklingar við intensivum og bráðfeingis tørvi
- minst 2 ára royndir á medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- intensiva eftirútbúgving ella aðra viðkomandi eftir-, víðari-, serútbúgving

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Margit Stórá, deildarleiðara á G1, lokal 5811, mast@lsh.fo ella Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 16. mars 2007 kl.12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til A2

Tvey føst størv á brøki 0,7 eitt í skiftandi vaktum og eitt í kvøld- og náttarvaktum eru leys at søkja til setan 1. apríl 2007.
Eisini eitt avloysarastarv á brøki 0,8 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan 1. apríl til og við 31. desember 2007.

A2 er ein føði- og barsilsdeild við einari neonatalari eind. Deildin stendur fyri einari broyting, har tað verður ein kompliseraður partur undir leiðslu av sjúkrarøktarfrøðingi, og ein ókompliseraður partur, sum verður ljósmøðraleiddur.

**Førleikakrøv**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fleksibul og kreativ/ur
- hug til tvørfakligt samstarv

**Fyrimun hava umsøkjarar við royndum innan neonatalogi**

**Nærri fæst at vita** við at ringja til Annu Helenu Danielsen, sjúkrarøktarfakligur leiðari, lokal 5002 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 16 mars 2007, kl 12.00

## Klinikkasssistentur (avloysari)

Eitt starv á Tannlæknadeildini fyri klinikkassistent í barnsburðarfarloyvi er leyst at søkja til setan 1. apríl 2007 ella eftir avtalu til 31. oktober 2007 við møguleika fyri leingjan.

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Erling Johannesen, tannlækna, lokal 5380.

**Umsóknarfreistin er** 14. mars 2007 kl.12.00

### Onnur størv  Sí meira á www.lsh.fo

**Avl. fyri yvirlækna til Anestesideildina á Bráðdeplinum**
Umsóknarfreistin er 5. mars 2007

**Bioanalytikarar**
Umsóknarfreistin er 16. mars 2007

**Summarfrítíðaravloysarar s.s. sjúkrarøktarfr., pleyg., heilsurøkt., radiogr. og ljósmøðrum**
Umsóknarfreistin er 14. mars 2007

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Skurðgongd og G4**
Umsóknarfreistin er 9. mars 2007

## Varaleiðari til B8 (avloysari)

Eitt avloysarastarv á brøk 1,0 sum varaleiðari á B8 er leyst at søkja til setan 1. apríl ella eftir avtalu og til og við 31. desember 2007.

Deildin er júst nýumvæld. Faklig menning, fyrsta modul av cardiologisku eftirútbúgving er júst byrjað. Aðrar áhugaverdar avbjóðingar liggja fyri framman, nú ætlanin er at implementera THS í heyst.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**

- saman við deildarleiðara menna deildina
- virkandi leiðari, tá deildarleiðarin er burturstaddur
- ábyrgd av lesandi í klinikkini
- verða við í klinisku røktini at viðgera og røkta hjartasjúklingar

**Vit kunnu bjóða**

- innleiðslu
- arbeiðið er fjølbroytt, og tær nógvu avbjóðingarnar gera størvini sera spennandi
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv

**Krøv til umsøkjarar**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan førleika í røkt og viðgerð innan cardiologi
- áhuga í leiðslu
- áhuga í fakligari menning av starvsfólkum
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- sjálvstøðugur, kreativur, hava visionir
- teldukunnleiki

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**

- cardiologiska útbúgving
- kliniska praktikvegleiðaraútbúgving
- leiðsluútbúgving

**Starvslýsing og fleiri upplýsingar** fáast við at ringja 304500 til Astu Joensen, deildarleiðara, lokal 6068, asjo@lsh.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, asap@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 19. mars 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Barnadeildina B5

Eitt fast starv á brøk 1,0 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan frá 1. mai 2007 ella eftir avtalu. Eitt avloysarastarv á brøk 1,0 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan frá 1. apríl 2007 ella eftir avtalu og til og við 31. desember 2007. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Barnadeildin hevur pláss fyri 7 børnum í aldrinum 0 – 14 ár. Deildin er júst umvæld, og pláss er til barnaambulatorium á deildini. Deildin er byrjað við THS (Talgild Heilsu Skipan).

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**

- røkt og viðgerð til børn í aldrinum 0 - 14 ár.

**Vit kunnu bjóða**

- innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum avbjóðingum

**Krøv til umsøkjaran**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av børnum

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Gunnvá G. Viderø, virkandi deildarleiðara, lokal 6055 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, asap@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 19. mars 2007 kl.12.00

## Sjúkrarøktarfr. og heilsurøktarar/pleygarar til Psyk. D 4/5

Á Psykiatrisku D4/5 eru hesi størv leys at søkja í skiftandi vaktum:

- eitt fast fulltíðarstarv frá 1. apríl 2007.
- tvey føst størv á brøk 0,7 og 0,8 frá 1. juni 2007.
- eitt avloysarastarv á brøk 0,7 frá 1. apríl til og við 31. august 2007.

Deildin er ein psykiatrisk rehabiliteringsdeild/bústovnur. Arbeitt verður eftir miljøterapeutiskum meginreglum og við at menna brúkarar til økt sjávbjargni.

**Krøv til umsøkjarar**

- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari ella pleygari
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan psykiatriska økið

**Vit kunnu bjóða**

- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Liss Jakobsen, deildarleiðara, lokal 4005, LiJa@lsh.fo ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin er** 16. mars 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingjaplássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo